STUTT SAGT

## Norkur country sangari vitjar í september



Tað er kanska góð tíð enn, men tey sum dáma væl countrytónleik og – dans, kunnu longu nú byrja at gleða seg til árliga country-dansin, sum AB skipar fyri.

Í ár verður hesin hildin ann 16. september, og verður tað aftur í ár Ítróttarhøllin á Hálsi í Havn, sum verður karmur um tiltakið.

Høvuðsnavnið er norski Ove Støylen, sum hevur verið sera vælumtóktur, og afturat sær hevur hann Twilight, so keðiligt verður tað undir ongum umstøðum.

AB-stuðlarnir siga frá, at forsølan til dansin verður lýst nærri innan alt ov langa tíð.

*-mørk*



## Læra at seyma skinn í Vági

Í døgunum 29. juni til 6. juli verður skeið í at seyma skinn. Hetta er ein máti at seyma skinn saman, sum norðmenn hava gjørt í øldir. Tað er Sirri í Vági, sum stendur fyri skeiðnum, og hava tey fingið Ingrid Strand úr Noreg at halda skeiðið.

Ingrid er væl kend í Noreg, har hon í drúgva tíð hevur arbeitt við aldargamla siðnum. Umframt skeiðið, verður talan eisini um áhugaverdan fyrilestur, har ríka søgan handan skinnfell eisini verður verður lýst.

*-mørk*

## Nýggja barnaverndarlógin á breddan

FUNDUR

Týskvøldið kl. 19:00 skipar Føroya Pedagogfelag fyri almennum fundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Evnið hesaferð er nýggja barnaverndarlógin, sum byrjaði at virka í 2006

### Fyrilestrar og kjak

Fyrilestararhaldarar á fundinum verða Birita L. Poulsen og Anna Dam. Á fundinum fara tær báðar at greiða frá høvuðsinnihaldinum í barnaverndinalógini, har dentur verður lagdur á, hvørjar fyriskipanir kunnu setast í verk eftir lógini. Eisini verður komið inn á fráboðanarskylduna hjá fakfólki.

Birita L. Poulsen, løgfrøðingur, arbeiðir hjá Løgtingsins Umboðsmanni. Birita hevur áður starvast á Almanna- og Heilsumálaráðnum, har hon m.a. hevur verið við til at tilevna nýggu barnaverndalógina.

Anna Dam, advokatur, er leiðari á Barnaverndarstovu Føroya, og fer hon at greiða frá virkseminum higartil á nýggja felagskommunala stovninum.

Fundurin varir í umleið 2 tímar. Møguleiki verður eisini at seta fyrilestrarhaldarunum spurningar, samstundis sum at lagt verður upp til kjak.



*Tað tók eina løtu hjá teimum báðum Randi S. Vang og Jónhild Johannesen at fylla bingjuna, sum nú er á veg til Íslands, á tremur við føroyskum listhandverki*

# Føroysk listainnrás í Íslandi

**Verk hjá ikki færri enn 33 føroyskum listhandverksfólkum eru í løtuni á veg til Íslands, har tey skulu sýnast fram á Listasavninum í Hveragerði**

LISTHANDVERK

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tær liggja ikki á tí latu síðuni, tær báðar Randi S. Vang og Jónhild Johannesen, sum vit serliga kenna frá afturvendandi listhandverkstevnuni Gluggaglæma seinnu árini. Í gjár stóðu tær klárar á Eystaru Bryggju í Havn at taka ímóti, tá verk hjá ikki færri enn 33 føroyskum listhandverkarum skuldu fáast upp á plass í eini stórari bingju, sum nú er á veg til Íslands.

### "Grannagróður"

Í Íslandi verða verkini partur av íslendskt/føroysku framsýningini "Grannagróður" á Listasavninum Árnesinga í Hveragerði. Framsýningin er komin í lag, eftir at stjórin á savninum, Birna Kristiansdóttir, hevði hoyrt um føroysku framsýningina Upprák, ið Randi og Jónhild skipaðu fyri í Norðurlandahúsinum og Müllers Pakkhúsi í fjør. Birna Kristiansdóttir ferðast javnan runt í Norðurlondum at kunna seg um lokalt listhandverk, og eftir at hava sæð Upprák bjóðaði hon Randi og Jónhild at skipa fyri framsýning í Hveragerði.

Tær báðar hava síðani sett seg í samband við 33 føroysk listafólk, ið tær saman halda umboða føroyskt listhandverk serliga væl – bæði hvat viðvíkur dygd og fjølbroytni. Við á framsýningini verða sostatt dømi um sniðgeving, binding, tøving, videolist, grótlist, møbilsnið, leirlist, seyming, bein/hornlist, myndlist og veving. Flestu av listafólkunum hava fleiri verk við, ið eru gjørd serliga til hesa framsýningini. Í næstu viku fara Jonhild og Randi so til Íslands, har tær skulu standa fyri stóru avbjóðingini at seta óvanliga fjøltáttaðu framsýningina saman.

### Íblástur til umstøður

Í Íslandi fara Jónhild og Randi eisini at kunna seg um, hvussu lista- og handverks verkætlanir sum eitt nú Gluggaglæma verða skipaðar har. Til dømis tók íslendska Forsetamálaráðið í 1994 stig til stóru verkætlanina Handverk og Hönnum, sum verður fíggjað av Forseta-, Almanna- og Vinnumálaráðunum. Birna Kristiansdóttir er í løtuni nevndarformaður í verkætlanini, ið hevur til endamáls at stimbra íslendskt listhandverk, skapa útbúgvingarmøguleikar og sum heild økja um tilvitanina um týdningin av íslendskum listhandverki – bæði sum partur av landsins mentanararvi og sum týðandi partur av modernaðum íslendsku vinnulívi.

Randi og Jónhild dylja ikki yvir, at tær kundu ynskt sær eina líkandi skipan at virka undir í Føroyum. At áhugin bæði uttanlands og millum listafólk herheima fyri føroyskum listhandverki bara veksur er hendan framsýningin í Íslandi kanska besta dømi um. Men eftirhondini sum arbeiðið við hesum verkætlanum hevur vundið uppá seg, er tað eisini vorðið munandi meir orkukrevjandi. Tí hevði tað verið ynskiligt, at játtan var sett av, so umstøður og arbeiðsfriður varð at skipa hetta arbeiðið meir miðvíst og samanhangandi, siga tær báðar.

**FAKTA**

Føroyska listhandverksframsýningin »Grannagróður« verður at síggja á listasavninum Árnesinga í Hveragerði í tíðarskeiðinum 24. juni til 30. juli. Í oktober verður høvi at síggja framsýningina í Norðurlandahúsinum.

**Við á framsýningini verða:**

Torkil Vilhelmsen, (møbilsnið); Poulina Jóanesardóttir og Tita Winther, (veving); Oddny í Lon, Marita Guttesen, Arndis Lindberg, Tóra Bærentsen, Poulina av Steinum, Wanja Petersen og Gisley Bonde (binding); Jóna Dalsgarð, Guðrið í Stórustovu, Malan á Lofti, Inga Maria Vang, Katrina í Geil, Berit Heinesen, Randi Olsen, Anna Kristin Bæk, Jóhanna Reginsdóttir av Steinum og Dania Danilesen (snið); Ása Hátún, Hanne Lisa Falk, Maria Mørkøre, Astrid Andreassen og Guðrun Elttør (tøving og tekstil); Marita S. Sigurðardóttir og Beinta Vilhelmsen (seyming); Daniel P. Lamhauge (smykkur); Eyðun Dal-Christiansen (grótlist); Guðrið Poulsen (leirlist); Oggy Lamhauge og Jóna Rasmussen (grafikk) og Martin Mohr Olsen (videolist)